gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Ein rangsnúgving

Tað er einki annað enn rangsnúgving av ringasta slag, tá formenninir í teimum trimum landsstýrisflokkunum siga eftir seinastu veljarakanningina, at atkvøða føroyingar nei tann 26. mei, so atkvøða føroyingar Føroyar inn í danska ríkið. Hetta er fullkomiliga burturvið, og eitt dømi um, at landstýrisflokkarnir royna at villleiða fólk.

Fólkaatkvøðan tann 26. mei um fullveldisgongdina er bara ein vegleiðandi fólkaatkvøða. Okkara lógargrundarlag heimilar bara vegleiðandi fólkaatkvøðum. Líka mikið um føroyingar atkvøða ja ella nei, so atkvøða vit okkum hvørki úr ella inn í danska ríkið.

Føroyar vórðu ikki eftirspurdar, tá grundlógin varð sett í gildi fyri Føroyar í 1849. Tá heimastýrislógin varð sett í gildi hundrað ár seinri, limaðu vit okkum heldur ikki formliga inn í danska ríkið, eins og Grønland gjørdi, tá tað fekk sína heimastýrisskipan.

Vit kunnu øll tulka eitt úrslit ella eina veljarakanning ymiskt, og her skulu vit ikki tulka tulkingina hjá floksformonnunum, men bara afturvísa hasi demagogisku tulkingini. Hatta er ein roynd at ræða, eins og orðini hjá forsætisráðharranum um 4 ára skiftistíð, tilvitað ella ei, ræðir nakrar føroyingar.

Veljarakanningin staðfestir, at væl minni enn helvtin av føroyingunum tekur ikki undir við ætlan landsstýrisins, og at samgonguflokkarnir hava ikki meirilutan aftan fyri seg. Líka mikið um hetta er ein veljarakanning ella ei, so er landsstýrið í eini veikari samráðingarstøðu.

Enn er einki komið fram, um landsstýrisflokkarnir endurskoða ætlan sína, men orðini hjá forkvinnuni í Sjálvstýrisflokkinum søgdu nógv. Sambært henni hevur Sjálvstýrisflokkurin fingið sín vilja ígjøgnum, men veljarin tekur ikki undir við flokkinum!

Tí kann hugsast, at Sjálvstýrisflokkurin vil endurskoða ætlanina. Hesum tekur Fólkaflokkurin helst undir við, tí løgmaður hevur ferð eftir ferð sagt, at einki uppskot skal út til fólkaatkvøðu, sum ein meiriluti ikki tekur undir við. Tí má hann annaðhvørt fáa eina breiðari semju um eina skilabetri skipan ella leggja kongin.

Hann hevur einki annað val. At fara út at stríðast um hvørja atkvøðu, og kanska fáa ein tepran meiriluta skapar ikki politiskan tryggleika.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Hákun Jacobsen**
*f. 02.10.1926 d. 11.12.2000*



Tann 11. desember doyði abbi okkara eftir langa sjúkralegu. Ein kann ikki siga, at tað kom óvart á okkum, men tað var ringt at ganga niðri og ikki fáa høvi at siga farvæl. Men tíbetur hava vit nógv góð minnir um abba okkara.

Abbi var ein sera positivur persónur. Tað besta, hann visti, var at fortelja søgur, og nógvar dugdi hann. Serliga um gamlar dagar í Nólsoy. Abbi var ikki sjómaður, men onkran túrin hevur hann verið kortini. Serliga hava vit hoyrt nógv um ein túr við einum týskum trolara, har teir eisini løgdu leiðina fram við Portugal. Hetta var eitt stórt upplivilsi hjá abba, og mangan hava vit bæði hoyrt orðini: »Tá abbi var í Portugal…« Hann hevði ongantíð ferðast nógv, tí stóð hetta minni sum nakað serligt fyri hann.

Ein onnur søga, sum eisini er frá hansara sjólívi, var tá hann sum heilt ungur maður hevði verið ein túr á sjónum. Hann var komin aftur til Nólsoyar og fer sum vera man niðan í Krók. Hann kemur inn í køkin og sigur við mammu sína Elsbu, at hann helt seg hava fingið lús á túrinum. Gløgg kvinna, sum hon var, sá hon, at tað stóð ikki væl til og bað hann sleppa sær oman í kjallaran at lata seg úr. Tá vísti tað seg, at hann var so fullur í lús, at klæðini livdu. Serstakliga skipstroyggjan sá út, sum um hon skuldi fara til gongu. Og so flenti abbi í kíki.

Abbi visti sera nógv um veður og vind. Hann visti altíð, hvagar best var at fara, um farast skuldi út at reka. Somuleiðis visti hann eisini, um tað nú fór at rulla, um onkur skuldi inn við Rituni. Hann kendi sjóvarføll og ættir. Hetta var nakað, hann hevði lært seg av berum áhuga, tí onga skúlagongd hevði hann. Men sum búgvandi úti í Nólsoy er tað jú sera gott at kenna til veður og vind fyri ikki at koma í óføri á sjónum.

Sjúkan gjørdi, at lagið á abba var skiftandi. Tað vísti seg, at tá lagið var gott, plagdi hann at práta um kríggið. Hetta var óivað, tí at kríggið brast á, meðan abbi var hálvvaksin, og hann var ungur maður, tá tað endaði. Eingin ivi um, at tað hevur verið ein spennandi tíð fyri fólk á hansara aldri. So sjálvt um tað ljóðar løgið, vóru vit altíð glað fyri at hoyra um kríggj í Króki.

Tá vit vóru smá, var abbi meira sum ein pápi fyri okkum. Hann hevði okkum við sær í mongum. Vit hoyggjaðu, gingu á seiðaberg og gingu í kirkju við abba. So var eisini fjallgonga, heimaseyður, flettíng og nógv annað, vit minnast um abba. Vit vilja her senda eina heilsan til ommu, sum nú má venja seg við at vera einsamøll og somuleiðis eina heilsan til Hanna abbabeiggja.

Hvíl í friði, abbi.

**Trygvi og Sylvia**

# Postbilur tikin av hvirlu

**Ein hvirla tók postbilin, tá hann kom út úr Eysturoyartunnlinum mikumorgunin**

Ferðsluóhapp
*Eirikur Lindenskov*

Førarin á postbilinum, sum fór inn í Eysturoynna mikumorgunin, fekk ein rættuligan skelk.

Tá hann kom út úr tunnlinum Skálafjarðamegin, varð bilurin brádliga tikin av eini hvirlu.

– Eg royndi at bremsa og stýra, men einki bar til. Tað var sum at koyra á ísi, sigur bilførarin.

Bilurin, sum vigar eini 7-8 tons var trýstur út móti vegjaðaranum, men tíbetur rakti hann autoverjuna, og har stegðaði hann.

Bilurin fekk nakað av skaða, men fólkaskaði var eingin – men hetta var orsøkin til, at posturin varð seinkaður…



*Tíbetur helt bilverjan, tá hvirlan tók bilin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá sonur og beiggi okkara

**Óli Biskopstø**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu okkum so væl í sambandi við jarðarferðina.

*Heilsan*
**Randi, Jákup og Victoria**

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult cyan magenta svart



# Lognbrá steingir um 10 dagar

**Føstulávintsmánadag verður seinasti dansur í dansistaðnum Lognbrá í Klaksvík. Taparnir verða tey ungu undir 18 ár**

DISKOTEK
*Eyðun Klakstein*



*Danistaðið Lognbrá, sum hevur hildið til í KÍ-høllini síðani miðskeiðis í áttatiárunum, verður stongt um 10 dagar.*

*Mynd: TJ*

**Klaksvík:** Nú er avgerðin tikin um, at dansistaðið Lognbrá verður stongt.

Seinasti dansur verður føstulávintsmánadag, og eftir hendan dansin verður lykilin snaraður um fyri seinastu ferð.

– Vit hava roynt at funnið nýggj høli til dansin, men tað hevur ikki eydnast, sigur Jan Gardar, sum rekur Lognbrá.

– Vit hava havt samband við Klaksvíkar kommunu seinastu átta mánaðirnar, og vit hava hildið, at tað hevur gingið fram á. Men tað vísir seg nú, at har er einki ítøkiligt komið burturúr. Talan hevur verið um tóm orð.

### Nú er nóg mikið

Lognbrá hevur síðani miðskeiðis í áttatiárunum hildið til í KÍ-høllini í Klaksvík, men leigumál varð uppsagt í fjør. Klaksvíkar Ítróttarfelag, sum eigur KÍ-høllina, hevur aðrar ætlanir við hølunum, har Lognbrá hevur hildið til í, og tí er dansistaðið sett á gøtuna.

Ætlanin var, at Lognbrá skuldi lata aftur um ársskiftið, men leigumálið varð longt í tveir mánaðir, meðan Lognbrá royndi at finna loysn á hølistrupulleikunum.

– Kanska kundu vit hildið fram í KÍ-høllini eina stutta tíð afturat, men tað hava vit ikki hug til, sum støðan er blivin. Tí lata vit aftur nú, sigur Jan Gardar.

### Ófriður

Tapararnir verða tey ungu undir 18 ár, sum ikki sleppa inn á hinum dansistøðunum í býnum. Tey hava havt Lognbrá sum einasta møguleika, um tey skuldu í dans um vikuskiftið.

– Hetta er ein keðilig støða hjá Lognbrá at koma í, men tað verður ungdómurin, sum verður harðast raktur av hesum. Tey missa nú einasta dansistaðið, sum tey hava havt møguleika at brúka, sigur Jan Gardar.

Eini 800 fólk hava verið í dans í Lognbrá hvønn mánað, og tað eru fyrst og fremst tey undir 18 ár, sum hava brúkt dansistaðið.

– Fólk kunnu av røttum stúra fyri, at tað verður ófriðaligari í býnum framyvir, tí øll hesi fólkini, sum plaga at verða dans, mugu nú finna sær annað undirhald um vikuskiftið, heldur Jan Gardar.

Virksemið hjá Lognbrá fer ikki at liggja stilt, tí Lognbrá hevur eisini ljóðannlegg og aðra úgerð, sum verður leigað út til ymisk tiltøk kring landið.

Jan Gardar ætlar sær at leggja størri dent á hetta virksemið, eftir at diskotekið verður stongt.



# Gott ár hjá NFÍ

**Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð hevði góðan 80.000 krónur í avlopi farna ár**

FRÍTÍÐ
*Eyðun Klakstein*

Í kvøld hevur Norðoya Frítíðar- og Ítróttarráð (NFÍ) aðalfund á Sjómansheiminum, og tað verður ein væl nøgdur formaður, sum fer at lata formansfrágreiðing.

NFÍ hevði avlop upp á góðar 80.000 krónur, og tað er munandi meiri enn árið fyri.

Norðoyastevnan í fjør eydnaðist væl, og hon hevði við sær inntøkur til bæði feløgini og NFÍ.

### Kommunan er við

Í formansfrágreiðingini, sum Jan Gardar fer at geva á fundinum í kvøld, fegnast hann um, at Klaksvíkar kommuna í fjør læt NFÍ stuðul í sambandi við Norðoyastevnuna.

– Býráðið hevur skift ham frá at vera mótstøðulið til at stuðla NFÍ fíggjarliga, og tað fegnast vit um.

NFÍ fíggjar ein part av nýggja skýlinum við fótbóltsvøllin í Klaksvík, og felagið eigur rættin til at brúka tvær sektiónir undir skýlinum til virksemi hjá limafeløgunum hjá sær.

Aðalfundurin hjá NFÍ verður í kvøld klokkan 19.00.


# Nýtekning av partapeningi í P/F Smyril Line

**Í sambandi við hækkan av partapeningi í P/F Smyril Line upp til 300 milliónir kr., hava núverandi partaeigarar framíhjárætt at tekna upp til allan partapeningin.**

**Núverandi partaeigarar kunnu gera rætt sín galdandi til í seinasta lagi 23. februar 2001.**

**Partapeningurin verður hækkaður við tí fyrivarni, at nýteknaði partapeningurin verður 125 milliónir kr. innan 10. mars 2001.**




## Nýtekning av partapeningi í P/F Smyril Line

**Undirritaði partaeigari sum í dag eigur partabræv/ -brøv no. ______________**

**fyri tilsamans kr. ___________________**

**vil hervið nýtekna kr. ______________(min. 1.000,- kr. ella multipla av hesum)**

**Navn:** ________________________________

**Bústaður:** ________________________________

**Bygd/ Býur:** ________________________________

The North Atlantic Link

SMYRIL LINE
Postsmoga 370 · 110 Tórshavn
tel 34 59 00 · fax 31 64 93 · E-mail: finance@smyril-line.fo